# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Heri Olsen, telegrafistur:

## 40 ára starvsdag á Sjóbjargingarstøðini MRCC



Hósdagin 7. september var hátíðarhald á Sjóbjargingarstøðini MRCC í Havn í sambandi við at Heri Olsen, telegrafistur, hevði 40 ára starvsdag á Tórshavnradio.

Heri er 57 ára gamal og havnarmaður. Hann fór sum 17 ára gamal í læru á Telegrafstøðini ella rættari hjá SNTS (Store Nordiske Telegraf Selskab) og tók prógv sum telegrafistur í 1969, og tað hevur verið hansara starv øll árini. Afturat hesum hevði hann eisini eina tíð ábyrgd av uttanlandskaðalunum, til hetta var yvirtikið av Telefonverkinum. Heri hevur gott innlit og gongur hundrað prosent upp í sítt arbeiði og vil at tingini skulu fungera.

Foreldrini hjá Hera eru: Oda, f. Gaard Hansen, úr Havn, og Ólavur Olsen úr Fuglafirði. Heri er elst av trimum brøðrum, hinir eru Ove og Kári, sum báðir arbeiða í Útvarpinum, har teir hava ríkað alt Føroya fólk við sínum mongu tónleikasendingum. Familjan er kend innan tónleikalívið í Føroyum, serliga fyri sín leiklut í Havnar Hornorkestri, har ein stórur partur av familjuni eisini spælir.

Heri er giftur Jóhonnu, f. Poulsen, av Skála, ið er útbúgvin og arbeiðir sum pedagogur. Jóhanna og Heri eiga tvey børn og hava júst nú verið í Italia í brúdleypi hjá dóttrini Oddvør, sum giftist har við einum skota. Sonurin, Tróndur, er á veg til Bretlands at fáa sær eina tónleikaútbúgving.

Heri var í síni tíð radioamatørur men fæst nú mest við tónleik, og harafturat fer nakað av hansara frítíð í bátinum, einum AWI 27, sum hann eigur saman við einum starvsfelaga. Teir eru ofta í fjørðinum og rógva eisini út á Norðhavinum, tá umstøður eru til tað.

Dagurin í morgin

13 september. Cyprianus, deyður í 258. Hann var sakførari og lærari í Kartago, men 45 ára gamal gjørdist hann kristin og varð tvey ár sinni valdur til biskup. Hann skrivaði nógvar lærubøkur og søgubøkur, og handrit hansara eru týdningarmiklar keldur til søguna hjá fornkirkjuni. Hann var tikin av døgum undir Valerianus keisarara.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jacobina Berg, Hvalba**, vanliga nevnd **Bina**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 9. september, 83 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju mikudagin klokkan 13.00. Tey, sum vilja minnast Binu kunnu lata eina peningagávu til missiónshúsið í Hvalba, konta í peningastovninum.

**Joen Peter Ellingsgaard**, vanliga nevndur **Pedda í Garði, á Eiði**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 9. september, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju mikudagin klokkan 14.00. Tey, ið vilja minnast Pedda, kunnu lata Eiðis kirkju eina gávu. Konto í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður, fosturpápi, verfaðir, abbi, langabbi, bróður og svágur okkara

**Joen Peter Ellingsgaard**
vanliga nevndur Pedda í Garði, á Eiði,

andaðist á Landssjúkrahúsinum 9. september, 85 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju mikudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Sonja, Poul og Hans Petur**

*Tey, ið vilja minnast Pedda kunnu lata Eiðis kirkju eina gávu, konto í peningastovnunum.*

# Tøkk

Hjartans tøkk til øll, sum mintust

**Jón Gulak Jacobsen**
Hvalba

tá hann doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri sýnt hjálpsemi í sambandi við andlát og jarðarferð.

**Jákup, Jóna, Poul Laust, Marnar og Dania**